Álit

í

løgtingsmáli nr. 69/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (Løgtings- og landsstýrismenn v.m., broytt starvsheiti)

Formansskapurin, Bjørt Samuelsen, Jóhannis Joensen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Johan Dahl, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 2023 er tað beint § 25-nevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 14., 17. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Bárð Larsen, lektara, Maluna Marnersdóttir, professara í bókmentum, og Turið Sigurðardóttir, professara emerita, umboð fyri Demokratia og Javnstøðunevndina, Málráðið og Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum og við løgmann, Aksel V. Johannesen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Johan Dahl, Kristianna Winther Poulsen og Karlot Hergeirsson) heldur tað vera rætt at dagføra heitini hjá løgtings- og landsstýrisfólkum og øðrum politiskum embætum soleiðis, at hesi í størri mun avspegla dagsins talumál, har heiti, knýtt at kynunum báðum og felagsheiti verða javnsett.

Við hesum verða heitini løgtingsmaður, løgtingskvinna og løgtingsfólk javnsett og góðkend at nýta formliga, eins og landsstýriskvinna og landsstýrisfólk verður javnsett við landsstýrismann, løgtingsforkvinna við løgtingsformann, og løgkvinna við løgmann. Samstundis verða løgtingsfólk og tingfólk sett inn í Tingskipanina og Stýrisskipanarlógina sum felagsheiti fyri kvinnur og menn, ið sita á Løgtingi.

Heitini verða longu brúkt í dagligari talu og í virksemi Løgtingsins, men eru ikki formliga góðkend. Tí verða eitt nú løgtingskvinnur í dag noyddar at undirskriva seg løgtingsmenn, hóast tær í flestu førum verða róptar løgtingskvinnur. Sama er galdandi fyri løgtingsformannin, har kvinna í starvinum í tingsalinum verður nevnd "frú forkvinna", ímeðan formliga skrivliga heitið framvegis sambært tingskipan og stýriskipanarlóg er "harra formaður". Onnur politisk starvsheiti verða dagførd samsvarandi.

Uppskotssetarar og § 25-nevndin hava ráðført seg við Málráðið og onnur málkøn. Tilráðing frá Málráðnum er fylgiskjal til málini bæði. Uppskotini fylgja í stóran mun tilráðingum frá Málráðnum; eitt nú verður valt at halda fast í møguleikanum, uttan mun til kyn, at nevna seg løgtingsmann, sum søguliga hevur verið felagsheitið fyri tingmenn og tingkvinnur. Sama verður galdandi fyri landsstýrisfólk.

Nakað av iva hevur verið um heitið løgkvinna, ið av givnum orsøkum ikki verður nógv nýtt í dagligari talu, og sostatt ikki kann sigast at hava vunnið hevd. Løgmaður verður mett sum eitt heiti við longri søguligari tyngd enn hini heitini, og sipar til embætið sjálvt, uttan mun til um kvinna ella maður situr

í embætinum. Meirilutin hevur valt at halda fast í uppskotinum um, at tá kvinna kemur í embætið sum løgmaður ber til at nýta heitið løgkvinna við somu grundgeving, sum fyri hini heitini, at maður á nútíðarføroyskum merkir mannfólk og ikki menniskja.

Meirilutin heldur tað hava týdning, at talaða málið og formlig starvsheiti avspegla ta broyting og menning, ið fer fram í samfelagnum, og er ikki í iva um, at løgkvinna, tó at tað fyri summi ljóðar knortlut ella fremmant nú, fer at verða púra natúrligt, tá fleiri kvinnur hava sitið í tí embætinum.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum, sum tað er lagt fram, og leggur fram broytingaruppskot, sum bert hevur til endamáls at gera onkra áseting í uppskotinum greiðari. Meirilutin vísir annars til viðmerkingarnar í uppskotinum og fylgiskjølum.

Meirilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 1 verður § 1 a, nr. 4 orðað soleiðis:
   "4) løgmaður ella varaløgmaður, kann almenna starvsheitið vera løgkvinna ella varaløgkvinna."

2. § 2 verður orðað soleiðis:
   "Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

Viðmerkingar:
Til nr. 1
Heitið varaløgmaður er ikki nevnt í upprunauppskotinum. Hildið varð, at tá løgmaður varð nevndur, fevndi hetta tilsvarandi um varaløgmann. Fyri at eingin ivi skal vera, verður hetta ásett beinleiðis. Við hesi broyting kann almenna starvsheitið fyri varaløgmann eisini vera varaløgkvinna, tá ein kvinna situr í embætinum.

Til nr. 2
Í stýrisskipanarlógini er í § 57 ásett, at tá ið broytingar verða gjørdar í stýrisskipanarlógini, kann samtykta løgtingslógaruppskotið ikki beinanvegin verða staðfest av løgmanni. Hitt soleiðis samtykta løgtingslógaruppskotið skal eftir næsta val verða samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins og kann síðan verða staðfest á vanligan hátt av løgmanni. Hetta lógaruppskotið verður tí liggjandi í Løgtinginum, til eitt komandi Løgting hevur samtykt hetta eina ferð afturat í óbroyttum líki, og síðan verður tað tá sent løgmanni at kunngera.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:
Endamálið við uppskotunum er at tillaga Tingskipanina og Stýrisskipanarlógina til broytingar í føroyska málinum. Í nógvum málum, eisini føroyskum, hevur maður merkt menniskja. T.d. okkara tættast skylda mál, íslendskt, hevur hildið fast við hesa fatan. Í føroyskum hevur málið flutt seg til, at maður er maður, og kvinna er kvinna. Tað merkir, at maður fyri tey flestu ikki er felagsheiti fyri menniskja í dag.

Í Løgtinginum og í almenna rúminum eru heitini maður ella kvinna. Vit tosa um eina løgtingskvinnu ella ein løgtingsmann, ein landsstýrismann ella eina landsstýriskvinnu, eina forkvinnu ella ein formann. Minnilutin heldur, at henda broyting í málinum eigur at síggjast aftur í ting- og stýrisskipan. Vit hava í ymsu sessunum eina kvinnu ella ein mann.

Tað undrar tí minnilutan, at fyriliggjandi uppskot ikki avspegla hetta. Tí uppskotini taka mest sum menn úr ting- og stýrisskipan og lova mest sum ikki kvinnu inn í lógirnar. Nú skal bert standa løgtingsfólk og landsstýrisfólk. Tað er ikki í samsvari við málbroytingina í Løgtinginum og í almenna rúminum.

Minnilutin mælir tí til, at bæði kynini fáa pláss í heitum hjá politikkarum og skjóta tí upp broytingaruppskot um at, har tað stendur løgtingsfólk, so er talan um løgtingsmann ella løgtingskvinnu og tá tað í ting- og stýrisskipan stendur landsstýrisfólk, so er tað landsstýriskvinna ella landsstýrismaður.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 1 verður § 1 a, nr. 1 orðað soleiðis:
   "1) løgtingsfólk, er almenna starvsheitið løgtingsmaður ella løgtingskvinna."

2. Í § 1, nr. 1 verður § 1 a, nr. 3 orðað soleiðis:
   "3) landsstýrisfólk, er almenna starvsheitið landsstýrismaður ella landsstýriskvinna."

Viðmerkingar
Til nr. 1 og 2:
Starvsheitið verður antin løgtingsmaður ella løgtingskvinna og landsstýrismaður ella landsstýriskvinna, alt eftir lívkyninum á tí persóninum, sum situr í sessinum. Heitið løgtingsfólk og landsstýrisfólk verður bert nýtt um ein bólk ella einstakan persón, men ikki sum starvsheiti.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

§ 25-nevndin, 10. mai 2023

Bjørt Samuelsen formaður	Jørgen Niclasen næstformaður	Johan Dahl
Steffan Klein Poulsen	Kristianna W. Poulsen	Karlot Hergeirsson